# Samfelagsst

**Eins og undanfarin ár hevur samfelagsstevnan hjá Brøðrasamkomunum í Føroyum verið hildin í Havn. Stevnan byrjaði mikukvøldið 14. november í Ebenezer og endaði sunnukvøldið 18. november í Ítróttarhøllini á Hálsi**

Samfelagsstevnan 2007 byrjaði við bønarmøti í Ebenezer mikukvøldið 14. november.

Hósdagin vóru møtini í Ebenezer, og fríggjakvøldið var flutt niðan í Ítróttarhøllina á Hálsi.

Heitið á Samfelagsstevnuni 2007 var »Náðiverk Guds í okkum og út frá okkum«

Á skránni vóru bønarmøtir, uppbyggingarmøtir, evangelisk møtir og ungdómsmøtir. Stevnan var merkt av nógvum sangi frá ymiskum kórum og sangbólkum.

Seinasta møtið á Samfelagsstevnuni 2007 var sunnukvøldið 18. november kl. 19. Sum tað hevur verið siður seinastu nógvu árini, varð møtið útvarpað gjøgnum Kringvarpið.

Høllin á Hálsi var fullsett hetta kvøldið. Jákup N. Olsen endaði stevnuna, og sum siður hevur verið varð endað við at syngja »Gud við tykkum inntil næstu ferð«.

*mg*

*Myndir: Jens Kristian Vang*













